

## Vísindasiðsemisnevndini fingið heimasíðu

Nú ber til hjá øllum at síggja, hvat arbeiðið hjá Vísindasiðsemisnevndini fevnir um, tí nevndin hevur latið sína egnu heimasíðu upp. Hon eitur www.vsn.fo. Her sæst, hvørjar verkætlanir og granskingarætlanir Vísindasiðsemisnevndin skal taka støðu til og hevur tikið støðu til. Vísindasiðsemisnevndin er ein ráðgevandi tilmælisnevnd, og hon tekur endaliga støðu til, um eitt nú ein granskingarætlan verður útint í verki ella ikki. Gunhild Isfeldt, lækni, er formaður í Vísindasiðsemisnevndini, sum í løtuni annars er mannað við Dorrit Bech Joensen, lækna, Sonna Smith, journalisti, Malenu Arnholdsdóttir, sjúkrarøktarfrøðingi, Ingu Poulsen Dam, presti, Fróða Joensen, lækna og Kára Mortensen, studentaskúlalærari.

# FØROYAR fáa kappingarføra shippingvinnu



**Skulu vit taka tað fyri góða vøru, sum løgmaður og landsstýrisfólk við ábyrgd av vinnumálum søgdu á Shipping Føroyar 2008, fáa Føroyar um ikki so langa tíð eina FAS-skipan, sum verður kappingarfør við líknandi skipanir í okkara grannalondum. Hetta góvu bæði Jóannes Eidesgaard, Bjørt Samuelsen og Tórbjørn Jacobsen lyfti um, meðan 300 ráðstevnuluttakarar lýddu á**

SHIPPING 08

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ráðstevnan Shipping Føroyar 2008, sum varð hildin í Norðurlandahúsinum næst seinasta fríggjadag, hevði stóran áhuga millum føroyingar. Fleiri enn 300 luttakarar vóru við til tiltakið, sum eydnaðist sera væl.

Umboðini fyri landsstýrið, løgmaður, Jóannes Eidesgaard, Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna í vinnumálum og Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, góvu øll trý lyfti um, at nú skal FAS-skipanin gerast kappingarfør.

Her var eingin slingur í valsinum.

Tað var løgmaður, Jóannes Eidesgaard, sum setti stevnuna, og hann ásannaði, at nógv hevur verið tosað um at fáa shippingvinnuna at veksa, men at lítið og einki hevur verið gjørt við hetta.

Løgmaður gav lyfti um, at nú skal nakað henda, og í samgonguskjalinum hevur samgongan sett sær fyri at gera FAS (Føroysku Altjóða Skipaskrásetingina) kappingarføra við skipaskrásetingar í okkara grannalondum.

### Bjørt og Tobbi

Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna, segði, at nú skal FAS gerast kappingarfør. Hon helt, at nú er nóg mikið tosað, samstundis sum lítið og einki hevur verið gjørt fyri at betra skipanina. Landsstýriskvinnan segði seg vera sinnaða at broyta skattligu viðurskiftini, so føroyingar í FAS fara at sleppa lættari í skatti. Hon segði seg kortini vænta, at hesin spurningur ivaleyst fer at elva til kjak.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Tórbjørn Jacobsen, var bersøgin, tá ið hann umrøddi, hvussu lítið er hent innan shippingvinnu seinastu nógvu árini. Hann vísti á, at føroyingum so líkt hevur alt bara verið fyribilsloysnir.

Tórbjørn vísti á, at lopið um gjónna má takast í einum – og ikki í tveimum. Hann helt, at um vit taka lopið í tveimum, enda vit ryggbrotin niðri í gjónni.

### Dugnalig sjófólk

Anne Jorunn Møkster, ið er forstjóri í Simon Møkster Shipping, sum hevur nøkur skip skrásett í FAS, helt eisini, at ábøtur mugu gerast á skipanina. Hon ivaðist ikki í, at føroyingar hava førleikar at fáa nógv burtur úr shippingvinnuni, tí teir 100 føroyingarnir, hon hevur í arbeiði, prógva hvønn dag sítt dugnasemi.

Eisini Albertus Zwiers, tekniskur stjóri í Mærsk Supply Service og Klaus Kjærulff, forstjóri í Torm, nevndu mongu føroyingarnar, teir hava í arbeiði. Hjá Mærsk Supply Service starvast 81 føroyingar og hjá Torm 30. Mærsk legði eisini dent góða samstarvið við Sjóvinnudepilin, sum stendur fyri at útbúgva føroyingar hjá Mærsk í Føroyum.

### Nógv tilmæli

Annfinn V. Hansen, sum er formaður í Reiðarafelagnum fyri Farmaskip, legði fram ein langan lista av tilmælum til landsstýrið um, hvussu FAS-skipanin kann broytast. Ítøkiliga málið hjá Reiðarafelagnum fyri Farmaskip er, at 500 skip skulu vera



*Saman við Sjóvinnudeplinum og Reiðarafelagnum fyri Farmaskip, var Føroya Banki ein av fyriskiparunum av ráðstevuni*



*Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður, helt, at vit skulu taka lopið um gjónna í einum*